# Ungir og vaksnir klarinettspælarar í Havnar Kirkju



Matiné verður í Havnar Kirkju, leygardagin tann 8. desembur 2007 klokkan 11.30, har Føroya Klarinettorkestur spælir. Føroya Klarinettorkestur er vorðin ein fastur táttur í føroyskum tónleiki. Orkestrið hevur nú einar 20 limir úr øllum landinum og talan er bæði um børn, ung og vaksin, sum spæla klarinet. Felagið varð stovnað í 2001 og eftir eina spakføra byrjan, hevur tað spælt á nógvum ymiskum tiltøkum bæði í Føroyum og í øðrum londum. Seinasta stóra tiltaki var í juli í ár. Tá var orkestrið á 10-daga langari ferð í Álandi, har tað millum annað spældi saman við rútmubólkinum, sum tey vanliga spæla saman við á Alandia Jazz Festival. Luttakararnir høvdu á festivalinum høvi til at hoyra tónleikarar á høgum altjóða støði og tey siga, at tað var eisini ógloymanandi at síggja tað vakra oyggjalandið í fínasta summarveðrið. Um onkur burturgoymdur klarinetspælari er í Føroyalandi, sum kundi hugsa sær at spælt við í orkestrinum, erbara at halda seg framat. Á skránni tann 8. des. er klassiskur kirkjutónleikur af Bach og Bruckner, skotskur og walisiskur fólkatónleikur, operatónleikur av Gluck og sjálvandi vælkend og hugnalig jólaløg. **-áki-**



*Sakførararnir Jógvan Páll Lassen og Bjørn á Heygum eru samdir um, at samgonga ikki traðkaði fólkaræðið niður leygardagin, men fyri tað var framferðin ódámlig*

# Sakførarar: Ódámlig framferð av samgonguni

**Tað er ódámligt, at samgongan samtykkir at geva sær sjálvum nakrar eyka arbeiðsdagar, eru sakførararnir, Jógvan Páll Lassen, og Bjørn á Heygum, samdir um**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað, sum samgongan hevur gjørdi í Løgtinginum leygarmorgunin, er ódámligt.

- Men tað er ikki at bróta fólkaræðið.

Tað eru sakførararnir báðir, Bjørn á Heygum og Jógvan Páll Lassen, samdir um.

Teir sipa til, at samgongan beint nú hevur samtykt at stytta freistina til at útskriva løgtingsval úr seks vikum, sum tað er nú, niður í fýra vikur.

Sum tað sæst aðrastaðni í Sosialinum, er Tjóðveldið í øðini um hetta, tí mett verður, at hetta er at traðka á fólkaræðið, tí einasta endamál við hesum er at geva samgonguni tvær vikur eyka at arbeiða í.

Men hesum eru sakførararnir báðir ikki samdir í.

- Fyri fólkaræðið er hetta ongin trupulleiki sum so, tí Løgtingið er yvir øllum og ger, sum tað vil. Er veljarin ónøgdur við framferðina, er bara at lata vera við at velja somu politikarar aftur, eru Jógvan Páll Lassen og Bjørn á Heygum, samdir um.

Men hinvegin eru teir eisini báðir samdir um, at framferðin er ódámlig so tætt uppundir eitt val.

Siðvenja hevur verið í Føroyum, eins og í londunum rundanum okkum, at tá ið val er útskrivað, heldur alt vanligt lóggávuarbeiði uppat og tað skuldi vera nú 8. desember.

- Men at samgongan broytir freistina so brádliga beint uppundir val og útvegar sær sjálvum tvær eyka arbeiðsvikur, er ódámligt, tí hon hevur havt heili fýra ár at framt tað lógarsmíð, hon hevur sett sær fyri, sigur Jógvan Páll Lassen.

Hinvegin dugir hann ikki at síggja, at hetta skal seta fólkaræðið í vanda.

- Tað er meiri út frá einum moralskum sjónarmiði, at eg haldi, at tað er ódámligt, at Samgongan skal noyðast at útvega sær nakrar eyka dagar, tí ov lítið er komið á skaftið í øllum valskeiðnum annars.

### Óhepnar avleiðingar

Heldur ikki Bjørn á Heygum heldur, at hetta er at seta fólkaræðið í vanda.

– Tað er ein orsøk til, at tað er siðvenja í londunum rundanum okkum, at alt politiskt arbeiðið, sum so, verður lagt stilt, tá ið val er útskrivað. Og tað hevur eisini verið vanligt í Føroyum.

– Orsøkin er, at nærmari vit koma vali, størri er vandi fyri, at politiskar avgerðir ikki einans verða merktar av sakligum orsøkum, men av øðrum ósakligum orsøkum og at avgerðir verða motiveraðar av, at val er í hondum

– Og tí er vandi fyri, at avgerðir verða tiknar, sum ikki eru skynsamar og har aðrar grundir enn bara sakligar orsøkir, liggja undir. Tí er vandi fyri, at lógarsmíðið verður so óheft, sum tað í grundregluni eigur at vera.

Hinvegin ásannar Bjørn á Heygum, at verður hugt við ógvuliga strangum og formligum brillum, er onki sum forðar løgtinginum og samgonguni at arbeiða til løgtingsval er.

- Men fyri at sleppa undan at taka óhepnar avgerðir, er tað siðvenja, at lógarsmíðið sum so heldur uppat, tá ið val er útskrivað. Og ta aðalregluna hava lógarsmiðirnir í Føroyum eisini havt virðing fyri.

Men nú hevur Løgtingið beint uppundir val útvega sær sjálvum tvær eyka arbeiðsvikur.

- Hetta eitt óheppið og ódámligt signal at senda út, tí hetta ber brá av væntandi virðing fyri fólkaræðisligari siðvenju, sigur Bjørn á Heygum

- Tað signalið er ikki serliga uppbyggjandi, tí fáa vit illgruna um, at tey fólkavaldi ikki virða grundleggjandi siðvenju nóg høgt, kunnu vit spyrja okkum sjálvi, hvat tað næsta verður.

Og tað kann máa álitið undan politisku skipanini, men hann dugir ikki at síggja, hetta beinleiðis skal vera at ganga fólkaræðinum ov nær.

# Óneyðugt hjá løgmanni at skunda sær

**Samgongan hevur givið sær sjálvum tvær vikur afturat**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Løgmaður fær nú betri stundir, tá ið hann skal útskriva val.

Løgtingsval skal eftir vera 19. januar og eftir skipanini, sum hevur verið galdandi, skuldi løgmaður sostatt havt útskriva valið longu 8. desember, tí freistin hevur verið seks vikur.

Eftir siðvenju skuldi alt vanligt lógarsmíð hildið uppat tá.

Men nú hevur løgtingið samtykt at stytta freistina niður í fýra vikur. Sostatt er ikki neyðugt hjá løgmanni at útskriva val fyrrenn 22. desember.

Freistin upp á seks vikur, varð ásett í eini tíð, tá samfelagið og samskiftismøguleikarnir als ikki vóru tað, teir eru í dag. Í dag ber til at fyrireika val við styttri freist, og veljarin kann verða kunnaður og fylgja øllum, sum fyriferst í sambandi við val, hvar enn hann er staddur, við teimum samskiftismøguleikum, sum eru tøkir í dag. Somuleiðis er gjørligt at greiða brævatkvøðu og at fáa hesar fram við styttri freist, sigur samgongan.

### Tvær vikur afturat

Men sostatt hevur Løgtingið og serliga samgongan, útvegað sær arbeiðsfríð í 14 dagar afturat.

Samstundis hevur Løgtingið eisini samtykt, at ein flokkur, sum fær minni enn 4% av atkvøðunum, skal ikki fáa umboð á tingi.

Fyri at tryggja eitt loyniligt val, er tað eisini samtykt, at onki valstað skal hava færri enn 10 veljarar.

Á seinasta løgtingsvali var bara eitt av teimum 65 valstøðunum, sum hevði færri enn 10 veljarar. Tað var Syðradalur í Kalsoy og tað valstað er longu niðurlagt. Annars høvdu fýra valstøð ímillum 10 og 20 veljarar á seinasta løgtingsvali.

Harafturat hevur Løgtingið áður samtykt, at hereftir skulu 33 umboð veljast á ting, nú eru tey 32.

Sum tað sæst aðrastaðni í blaðnum, var orðaskiftið um málið rættiliga hvast. Høgni Hoydal, formaður í Tjóðveldinum helt, at hetta minti mest um eina bananrepublikk, har samgongan ikki fýrdi fyri at traðka fólkaræðið undir fót fyri at longja sína egnu stjórnartíð í tvær vikur.

Samgongan svaraði aftur, at trupulleikin hjá Tjóðveldinum var, at hann ræddist tankan um, at samgongan var arbeiðsfør og at hon skuldi fáa tvær vikur aftur.

Tveir sakførarar, sum vit hava tosað við, eru ikki samdir í, at fólkaræðið varð traðka undir fót, men teir hildu kortini, at framferðin hjá samgonguni var ódámlig.

